# Veðrið



Fimm-daga-for-søgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, men minkandi út á dagin. Skýggjað við ælaveðri. Hitin millum 8 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin, sunnudagin, mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av norði ella útnyrðingi, stundum tó upp í stívt andøvsgul. Skýggjað við ælaveðri, men eisini nakað av sól av og á. Hitin millum 4 og 8 stig.




*Kartni Olsen, formaður í Tórshavnar Bátafelag, (v.m.), og Øssur Hjalt, næstformaður, (h.m.), fingu kekk handaðan frá Jóannesi Andreasen, (í miðjuni)*

# Kekkur til Bátafelagið

*Tórshavnar Bátafelag fekk mikukvøldið peningagávu at brúka til felagshúsið*

EDVARD JOENSEN

Mikukvøldið fekk Tórshavnar Bátafelag ein kekk áljóðandi 20.000,- krónur, sum brúkast skulu til at fríðka um felagshúsið í Vágsbotni.

Hetta vóru sponsorpengar, sum Jóannes Andreasen í Havn hevur savnað saman frá 28 fyritøkum í býnum, sum vilja stuðla felagnum.

Øssur Hjalt, næstformaður í Tórshavnar Bátafelag, sigur, at felagið heitti á Jóannes um at hjálpa til at fáa pengar. Og tað hevur hann so gjørt.

Mikukvøldið varð so hesin kekkurin handaður, og skulu pengarnir millum annað brúkast til at gera eina altan á húsini, sigur Øssur Hjalt.

Eisini er gjørt eitt skreytblað ella »certificat« við navninum hjá Bátafelagnum á, sum siglarar, ið koma hendan vegin, kunnu keypa fyri 100,- krónur. Hetta er eisini eftir hugskoti frá Jóannesi Andreasen, sigur Øssur Hjalt, næstformaður i Tórshavnar Bátafelag.

Umframt at vera ein inntøka hjá Bátafelagnum, er ætlanin at hetta skreytblaðið skal vera ein váttan hjá fremmandum siglarum um, at teir hava verið í Føroyum um Atlantshavið.

Soleiðis at hava hangandi umborð ella heima í stovuni, sum Øssur tekur til.

Øssur Hjalt sigur, at Bátafelagið er Jóannesi sera takksamt fyri hjálpina, hann hevur veitt teimum.

Annars sigur næstformaðurin í Bátafelagnum, at mánadagin fer ein konvoj av bátum til Noregs við Norrønu.

Talan er um 10 bátar við limum úr Tórshavnar Bátafelag. Ein bátur er úr Syðrugøtu, meðan hinir eru úr Havn.

Farið verður við Norrønu til Bergen, har bátarnir verða flotaðir. Síðan er ætlanin at sigla innanskers í Noreg og njóta tann norska skergarðin, sigur Øssur Hjalt.

Hann sigur, at slíkir túrar hava fyrr verið gjørdir við sera góðum úrsliti.

Men tað hevur verið, áðrenn Tórshavnar Bátafelag var stovnað, og hetta er fyrst ferð, at bátar frá Bátafelagnum gera ein slíkan túr.

Fylgið kemur eftir ætlan aftur við Norrønu tann 12. juli, sigur Øssur Hjalt, næstformaður í Tórshavnar Bátafelag.




Eitt lágtrýst í ein útnyrðingi úr Írland fer í ein landnyrðing og væntast at blíva liggjandi yvir Skandinavisku hálvoynni eina tíð.




Somuleiðis verður eitt hátrýst liggjandi yvir Grønlandi. Millum hesi bæði hátrýstini rekur køld luft norðaneftir inn yvir Føroyar.




**Hitalagið mált frá 21./06. kl 06⁰⁰–22./06. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,6°C**
Minsti hiti máldur í juni: **0,0°** Mesti hiti máldur í juni: **20,0°**




Avfallið: 0,3 mm – **mált frá 21./06. kl 6⁰⁰–22./06. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juni: 46,3 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 9 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 17 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannahavn | 25 |
| Helsinki | 24 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 35 |
| Warzawa | 30 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 26 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 18 |
| New York | 26 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 11 |


TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes


## Vestfalskyrrindi

16. juni: Fullmáni
18. juni: Mánin longst frá jørðini
25. juni: Seinna kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. juni | 11.13 | 23.34 | 10.13 | 22.34 | 10.28 | 22.49 | 0.52 | 13.13 | 1.52 | 14.13 | 9.28 | 21.49 | 8.28 | 20.49 | 11.28 | 23.49 | 0.07 | 12.28 | 10.58 | 23.19 | – | 12.13 |
| 24. juni | 11.56 | – | 10.56 | 23.23 | 11.11 | 23.38 | 1.34 | 13.56 | 2.34 | 14.56 | 10.11 | 22.38 | 9.11 | 21.38 | – | 12.11 | 0.49 | 13.11 | 11.41 | – | 0.34 | 12.56 |
| 25. juni | 0.23 | 12.50 | 11.50 | – | – | 12.05 | 2.23 | 14.50 | 3.23 | 15.50 | 11.05 | 23.39 | 10.05 | 22.39 | 0.38 | 13.05 | 1.38 | 14.05 | 0.08 | 12.35 | 1.23 | 13.50 |
| 26. juni | 1.24 | 14.01 | 0.24 | 13.01 | 0.39 | 13.16 | 3.24 | 16.01 | 4.24 | 17.01 | – | 12.16 | 11.16 | 23.56 | 1.39 | 14.16 | 2.39 | 15.16 | 1.09 | 13.46 | 2.24 | 15.01 |

Kelda: Skipalistin 2000